## Føroysk Ph.D.- verja í Odense í dag

Seinnapartin í dag verjir Cand.med. Shahin Gaïni úr Havn Ph.D ritgerð í Odense. Evnið, sum Shahin hevur granskað í eitur: Nye inflammationsmarkører og nye metoder til evaluering af den inflammatoriske tilstand hos patienter med sepsis – ella brunatekin og kanningarhættir í sambandi við bróðeitran. Verjan fer fram í dag kl. 14 í Store Auditorium, Winsløwparken 15, 1., 5000 Odense C. Ábbyrgdarhavandi vegleiðari hevur verið: Klinisk lektor, dr.med. Svend Stenvang Pedersen, Infektionsmedicin, Klinisk Institut, Syddansk Universitet.



## Rýmir frá Kaupthing

Forstjórin í Kaupthing Banka í Noregi fer frá íslendska bankanum. Um hetta hevur nakað at gera við ivasomu støðuna hjá íløgufelagnum Exista, sum er høvuðseigari í bankanum, og sum sambært útrokningum, sum Nordea hevur gjørt fyri Børsen, nærum hevur mist allan eginpeningin, er ikki vist. Men tíðindastovan Direkt veit kortini at siga, at stjórin stingur í sekkin brinanvegin.

# Endurvenjing undirmett

**Vantandi fyribyrging innan eldraøkið leggur óneyðuga stórt trýst á heimarøktina. Royndir hava víst, at venjing tvær ferðir um vikuna í tríggjar mánaðir økir 50% um kropsstyrkina**

ENDURVENJING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Marita Tórsheim og Marjun Poulsen eru nevndarlimir í Fysioterapeutfelag Føroya*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Undirmett endurvenjing og vantandi fyribyrging eru størstu vandamálini innan eldrarøktina í Føroyum.

Tað halda tær báðar, Marita Tórsheim og Marjun Poulsen, nevndarlimir í Fysioterapeutfelag Føroya.

Alt økið er óskipað, og virkar ikki eins fyri øll fólk, men er tengt at, hvar í landinum ein býr. Í miðstaðarøkinum er bíðitíðin til endurvenjing áleið eitt ár, í Klaksvík eitt til hálvtannað ár, meðan bíðitíðin í Suðuroy er nakrir fáir mánaðir.

- Tað eigur at ruddast upp í lógini. Tað eigur at verða nevnt í sjálvum lógartekstinum, hvørjar sjúkur geva rætt til endurvenjing, siga Marjun Poulsen og Marita Tórsheim.

Sjúkur sum sclerosa, apoplexi (lammilsi í helvtini av kroppinum), kol (lungasjúkur), giktsjúkur og hjarta-æðra sjúkur eiga at verða nevndar í lógini sum sjúkur, ið geva rætt til endurvenjing.

Tær vísa eisini á álitið um endurvenjing, har sagt verður, at í ST-sáttmálanum um rættindi hjá fólki við førleikatarni stendur, at fólk við førleikatarni eiga rætt til – eftir egnum vali – at vera so sjálvstøðug sum møguligt. Endurvenjing er partur av hesum; við at tryggja rættin til endurvenjing tryggja vit, at Føroyar liva upp til ST-sáttmálan.

Eingin løggáva er í Føroyum, sum tryggjar fólki við førleikatarni endurvenjing ella viðlíkahaldsvenjing. Hetta merkir, at eingin trygd er fyri, at fólk við førleikatarni fáa endurvenjing.

### Ov lítil kapasitetur

Og hildið verður fram í álitinum:

Um tað skal tryggjast, at fólk við førleikatarni fáa eina endurvenjingarætlan, so skal rætturin til endurvenjing lógarfestast. Endurvenjingarætlan lýsir, hvønn tørv tann einstaki hevur á endurvenjing, og mælir til, hvar hann kann fáa hana.

Arbeiðsbólkurin mælir sostatt til:

At øll, sum hava førleikatarn og hava tørv á endurvenjing, fáa lógarfesta trygd fyri endurvenjing.

At øll, sum hava førleikatarn og hava tørv á viðlíkahaldandi venjing, fáa lógarfesta trygd fyri viðlíkahaldandi venjing.

At øll, sum hava førleikatarn og hava tørv á einari endurvenjingarætlan, hava lógarfesta trygd fyri at fáa eina slíka.

Hetta er so tað, sum mælt verður til at fáa við í lógartekstin, eitt annað er, at neyðugt verður at fáa í lag avtalur við privatu fysioterapeutarnar, tí kapasiteturin er nógv for lítil innan almennu skipanina.

- Tað er eisini ov lítli kapasiteturin sum ger, at bíðitíðin gerst so long, umframt at tað terir upp á fólk, sum brenna út í strævnu skipanini, siga Marjun Poulsen og Marita Tórsheim.

### Glottar á veg

Tær báðar vísa á, at fáa øll tey endurvenjing, sum hava tann tørvin, og sum annars hava førleikan til tað, merkir hetta, at tey gerast munandi kropssterkari og kunnu sjálvi klára uppgávur so sum innkeyp og annað, ið tey annars mugu líta á heimarøktina at gera.

Hetta hevði ikki bert verið gott og sunt fyri tey eldru, men eisini avlastað heimarøktina, sum er alt o villa mannað og hevur ov nógv at gera.

Ein verkætlan, sum Marjun Poulsen framdi í 2006, vísti, at venjing tvær ferðir um vikuna í tríggjar mánaðir styrkti tey luttakandi við 50%.

- Málið er jú, at tey gomlu skulu kunna vera heima longst møguligt, men við vantandi endurvenjingini fána nógv burtur og koma í eina ringa ringrás, og enda á institutiónum alt ov tíðliga, vísa tær báðar á.

Kortini eru glottar fyri framman, og serliga fegnar eru Marjun Poulsen og Marita Tórsheim um, at júst endurvenjing er nevnd í samgonguskjalinum.

- Ein samskipari skal setast í Nærverkinum, sum skal taka sær av hesum økinum. Hetta hevur verið eitt óskipað øki, men verður tað ført út í lívið, sum niðurfelt er í samgonguskjalið, so verður tað ein bati, sum fer at merkjast, siga Marjun og Marita.

Tað verður eisini munandi bíligari í longra endanum at seta inn við fyribyrging heldur en at royna at lappa upp á skaðar og vansar, ið standast av vantandi fyribyrging.

- Við verandi skipan er alla tíðina talan um at sløkkja eldar, tí tú fær bara avgreitt tað akutta, siga Marjun Poulsen og Marita Tórsheim, sum eru spentar upp á ætlaninar hjá nýggju samgonguni.

# Dagtilhald í Nólsoy

**Í morgin letur nýtt dagtilhald upp í Nólsoy, og í tí sambandi verður boðið til móttøku**

DAGTILHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú fær eisini Nólsoy sítt dagtilhald.

Arbeitt hevur verið í eina tíð við at broyta og umvæla eini sethús, sum fyrr vórðu keypt til endamálið. Innrættingin er broytt og ein koyrirampi er gjørdur, so fólk í koyristóli eisini fáa atgongd til dagtilhaldið.

Opið verður tríggjar dagar um vikuna, mánadag frá klokkan 13 til 17, og týsdag og hósdag frá klokkan 10 til 17.

Patricia Christiansen, vanliga nevnd Disa, verður fyriskipari, og á móttøkuni í morgin, sum verður millum klokkan 13 og 18, verður hóvi hjá fólki at síggja hølini, eins og ein drekkamunnur eisini verður at fáa.



*Tað er í hesum fyrrverandi sethúsunum, at dagtilhaldið í Nólsoy fer at halda til*
*Mynd: Leo Poulsen*